# Tilmæli

## um fiskiskap eftir toski, hýsu og upsa í

## 2024

HAVSTOVAN
FAROE MARINE RESEARCH INSTITUTE

# Tilmæli um fiskiskap eftir toski, hýsu og upsa í 2024

**Tal á tillutaðum fiskidøgum**

Fyribils umsitingarætlanin frá 6. mai 2019 var á heysti 2023 til viðgerðar í ráðførslubólkinum hjá landsstýrismanninum í fiskivinnumálum. Eitt høvuðsendamál var at víðka umsitingarætlanina við eini endurbyggingarætlan, sum kann fáa toskastovnin á føroyska landgrunninum upp á føtur aftur. Semja var í bólkinum um, at munagóð átøk máttu gerast við ringu støðuna hjá toskastovninum. Hóast tað ikki var full semja um, hvussu nógvir fiskidagar skuldu útlutast fyri 2024, tekur Havstovan útgangsstøði í teirri víðkaðu umsitingarætlanini, sum var til viðgerðar í ráðgevingarbólkinum, og mælir til, at:

1) Teir tillutaðu fiskidagarnir í 2024 fyri Bólk 2 (lemmatrolarar og partrolarar) verða minkaðir við 10% í mun til tillutaðu fiskidagarnar í 2023 (Talva 1).
2) Teir tillutaðu fiskidagarnir í 2024 fyri Bólk 3-5 (lína, snella og trolbátar) verða minkaðir við 20% í mun til tillutaðu fiskidagarnar í 2023 (Talva 1).

Hóast full semja ikki var um endurbyggingarætlanina, var tó semja um at halda fast við umsitingarætlanina frá 6. mai 2019 („Fiskidagaskipan og umsitingarætlan“) og fyrstu ferð sett í verk fyri fiskiárið í 2021. Sambært álitinum verður fiskiskapurin eftir toski, hýsu og upsa á føroyska landgrunninum stýrdur við fiskidøgum, umframt øðrum átøkum. Bólkur 2 (lemmatrolarar og partrolarar) verður stýrdur fyri seg, grundað á stovnsmetingina fyri upsa (Talva 2), meðan Bólkur 3-5 (lína, snella og trolbátar) verður stýrdur fyri seg, grundað á stovnsmetingarnar fyri tosk og hýsu (Talva 3).

Umsitingarætlanin er bygd á m.a. eina veiðureglu, sum hevur sum mál at halda gýtingarstovnarnar oman fyri ávís minstumørk og annars at halda veiðulutfølløm (veiðu dividerað við fiskibarum fiskastovni) innan fyri ávís mørk. Hesi mørk vóru dagførd av ráðgevingarbólkinum í 2023. Um tað gerst neyðugt at stilla talið á fiskidøgum, verður tað við júst 5% hvønn veg. Hetta merkir, at fiskidagarnir kunnu annaðhvørt minkast 5%, verða óbroyttir, ella økjast 5%, sí annars Talvu 1-4. Í framtíðini kemur væntandi ein endurbyggingarætlan at verða løgd inn í umsitingarætlanina.

Umsitingarætlanin verður væntandi send til ICES, tá endalig semja er fingin um hana í politisku skipanini og hjá vinnuni. Tá ICES hevur mett umsitingarætlanina at vera burðardygga, kemur ICES at ráðgeva sambært henni í framtíðini. Í ár er eitt ósamsvar millum ráðgevingina hjá Havstovuni og ICES, tí ICES hevur nýtt regluna um størstu varandi veiðu sum grundarlag.

Úrslitini fyri stovnsmetingarnar og metta veiðu í 2023 eru sett inn í veiðuregluna í Talvu 1.

*Talva 1. Gýtingarstovnar og veiðulutføll í mun til tilvísingarvirðir.*

| | Upsi | Toskur | Hýsa |
|---|---|---|---|
| **Gýtingarstovnur** 2023 (tons) | **49125** | **9165** | **42189** |
| Gýtingarstovnur, lágmark (tons) | 41400 | 29226 | 22843 |
| Omanfyri/niðanfyri: | **Omanfyri** | **Niðanfyri** | **Omanfyri** |
| Veiða 2022 (tons) | 16119 | 4866 | 8444 |
| Mett veiða 2023 (tons) | 13357 | 5868 | 7393 |
| Fiskibarur biomassi 2022 (tons) | 76215 | 11321 | 41023 |
| Fiskibarur biomassi 2023 (tons) | 63817 | 10866 | 41144 |
| **Veiðulutfall 2022** | **0.211** | **0.430** | **0.206** |
| **Veiðulutfall 2023** | **0.209** | **0.540** | **0.180** |
| **Miðal veiðulutfall 2022 og 2023** | **0.210** | **0.485** | **0.193** |
| Veiðulutfall, lágmark | 0.208 | 0.240 | 0.153 |
| Veiðulutfall, hámark | 0.264 | 0.310 | 0.270 |
| Omanfyri/ímillum/niðanfyri: | **Ímillum** | **Omanfyri** | **Ímillum** |
| Samlað úrslit fyri fiskidagar: | Bólkur 2: **10% minking** | Bólkur 3-5: **20% minking** | |

*Talva 2. Veiðureglan fyri bólk 2 í umsitingarætlanini.*

**Veiðureglan**

Bólkur 2 – upsi

| **Fiskidagatalið verður hækkað** | **Fiskidagatalið verður óbroytt** | **Fiskidagatalið verður lækkað** |
|---|---|---|
| • Gýtingarstovnurin av upsa er oman fyri lágmark<br>• Veiðulutfall av upsa er niðan fyri lágmark<br>• Báðar treytir mugu vera galdandi, um fiskidagatalið skal hækka | • Gýtingarstovnurin av upsa er oman fyri lágmark<br>• Veiðulutfall av upsa er millum lág- og hámark | • Gýtingarstovnurin av upsa er niðan fyri lágmark<br>• Veiðulutfallið av upsa er oman fyri hámark<br>• Um onnur av treytunum er galdandi, skal fiskidagatalið lækka |




*Mynd 1. Gýtingarstovnurin av upsa frá 1961 til 2022, frá stovnsmetingini í 2023. Óvissan er víst sum grátt øki. $B_{trigger}$ og $B_{pa}$ eru 41,4 túsund tons. $B_{lim}$ er 25,0 túsund tons. Reyðir krossar forsøgn: 2023=50.929 t, 2024=52.547 t.*




*Mynd 2. Veiðulutfall, sum er veiða í mun til fiskibaran upsastovn. Hámarkið er 0,264 og lágmarkið er 0,208.*



*Restin av úrslitunum frá stovnsmetingini eru at finna í Fylgiskjali 1.*

*Talva 3. Veiðureglan fyri bólk 3 - 5 í umsitingarætlanini.*

**Veiðureglan**

Bólkur 3 – 5, toskur og hýsa

| Fiskidagatalið verður hækkað | Fiskidagatalið verður óbroytt | Fiskidagatalið verður lækkað |
|---|---|---|
| • Gýtingarstovnurin av **bæði** toski og hýsu er oman fyri lágmark<br>• Veiðulutfallið er niðan fyri lágmark **bæði** fyri tosk og hýsu<br>• Báðar treytir mugu vera galdandi, um fiskidagatalið skal hækka | • Gýtingarstovnurin av **bæði** toski og hýsu er oman fyri lágmark<br>• Veiðulutfallið er niðan fyri hámark fyri bæði tosk og hýsu og oman fyri lágmark fyri **annaðhvørt** tosk ella hýsu | • Gýtingarstovnurin av toski **ella** hýsu er niðan fyri lágmark<br>• Veiðulutfallið er oman fyri hámark fyri antin tosk **ella** hýsu<br>• Um onnur av treytunum er galdandi, skal fiskidagatalið lækka |




*Mynd 3. Gýtingarstovnur av toski á Landgrunninum frá 1959 til 2022, frá stovnsmetingini í 2023. Óvissan er víst sum grátt øki. $B_{trigger}$ og $B_{pa}$ eru 29,2 túsund tons. $B_{lim}$ er 17,8 túsund tons. Reyðir krossar forsøgn: 2023=9.269 t, 2024=8.830 t.*




*Mynd 4. Veiðulutfall, sum er veiða í mun til fiskibaran toskastovn. Hámarkið er 0,310 og lágmarkið er 0,240.*




*Mynd 5. Gýtingarstovnur av hýsu frá 1957 til 2022, frá stovnsmetingini í 2023. Óvissan er víst sum grátt øki. $B_{trigger}$ og $B_{pa}$ eru 22,8 túsund tons. $B_{lim}$ er 16,5 túsund tons. Reyðir krossar forsøgn: 2023=42.894 t, 2024=60.502 t.*




*Mynd 6. Veiðulutfall, sum er veiða í mun til fiskibaran hýsustovn. Hámarkið er 0,270 og lágmarkið er 0,153.*

*Talva 4. Hvussu metta veiðan í 2023 varð roknað út. Tøl hjá Vørn fyri fyrstu 10 mánaðirnar í 2023 vóru samanborin við 2022 og faldað upp til alt árið (justering 1). Eisini vóru tølini hjá Vørn umroknað til ICES-tøl (justering 2).*

| Ár | Toskur | Hýsa | Upsi | Kelda | Árstíð | Viðmerkingar |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 2022 | 3524 | 5107 | 12080 | Vørn | Jan-okt | I |
| 2022 | 4524 | 7111 | 13608 | Vørn | Jan-des | II |
| 2022 | 4866 | 8444 | 16119 | ICES | Jan-des | III |
| 2022 | 1.28 | 1.39 | 1.13 | | | Justering 1 = II/I |
| 2022 | 1.08 | 1.19 | 1.18 | | | Justering 2 = III/II |
| 2023 | 4250 | 4471 | 10010 | Vørn | Jan-okt | IV |
| 2023 | 5456 | 6225 | 11277 | | Jan-des | IV x justering 1 |
| 2023 | 5868 | 7393 | 13357 | | Jan-des | IV x justering 1 x justering 2 |

**Støðan hjá upsa, toski og hýsu – stovnsmetingarúrslit**
Føroyski upsastovnurin (Mynd 1 og Fylgiskjal 1) er toluliga væl fyri og støddin á gýtingarstovninum er oman fyri tey mørk, har verjandi tiltøk eru neyðug. Veiðan hevur verið undir søguligum miðal síðan 2010 og veiðan var umleið 16 túsund tons í 2022. Miðaltalið av veiðulutfallinum í 2022 og 2023 er mett til at vera innan fyri mørkini (Mynd 2). Sambært langtíðar veiðuregluni skulu fiskidagarnir fyri Bólk 2 tí ikki broytast (Talva 1 og Mynd 2), men við tað, at toskastovnurin er illa fyri, og av tí, at Bólkur 2 fiskar tosk sum hjáveiðu, verða fiskidagarnir hjá Bólki 2 minkaðir við 10%.

Toskastovnurin á Landgrunninum (Mynd 3) hevur verið undir søguligum lágmarki síðani 2004. Í 2018 var toskastovnurin oman fyri lágmarksstødd av gýtingarstovninum, men síðan 2019 hevur stovnsmetingin víst, at stovnurin er aftur undir hesum marki. Sambært langtíðar veiðuregluni skulu fiskidagarnir fyri Bólk 3-5 minka 5%, men við tað, at toskastovnurin er undir vandamarkinum $B_{lim}$ (17803 t), verða fiskidagarnir hjá Bólki 3-5 minkaðir við 20%. Veiðulutfallið er eisini oman fyri hámarkið (Talva 1 og Mynd 4).

Føroyski hýsustovnurin (Mynd 5) var í tíðarskeiðnum frá 2008-2017 undir markinum, har serlig verjutiltøk eru neyðug. Hýsustovnurin kom upp um hetta markið í 2018 og hevur verið í vøkstri síðan. Vøksturin í gýtingarstovninum kemst serliga av 2016- og 2017-árgangunum, sum eru mettir til at vera størri enn miðal (Fylgiskjal 1). Miðaltalið av veiðulutfallinum í 2022 og 2023 er mett til at vera millum mørkini (Talva 1 og Mynd 6).



*Mynd 7. Gróður undir Føroyum, árini 1990 til 2023.*

**Umhvørvið**
Gróðurin av plantuæti er grundarlagið undir djóralívinum í sjónum. Gróðurin á Landgrunninum kann vera sera ójavnur frá einum ári til annað, og Havstovan hevur fyrr víst á, at á føroyska landgrunninum er týðiligt samband ímillum gróður øðrumegin og tilgongd og vøkstur av fiski hinumegin. Serliga eru tað tey góðu gróðrarárini, sum seta síni týðiligu spor í vistskipanina á Landgrunninum.

Hesi seinastu árini var várið og summarið í 2017 sera gott, 2018 og 2019 vóru um miðal og 2020-21 vánalig, meðan 2022 og 2023 var yvir miðal (Mynd 7). Hetta merktist væl í vistskipanini. Í 2017 kom nógvur yngul undan, ikki einans av toski og hýsu, men eisini av sløgum, sum hava týdning sum føði hjá botnfiski og sjófugli. Her eru nebbasild og hvítingsbróðir týdningarmikil (Mynd 8). Sum vanligt er, tá nógvur yngul er, so var hann eisini væl vaksin (Mynd 8).



*Mynd 8. Lutfalsligar nøgdir (ovara mynd) og miðallongdir (niðara mynd) av toska-, hýsu-, hvítingsbróðir- og nebbasildayngli í juni 1983-2023.*

Umframt at væl kom undan av toski og hýsu í 2017, so gjørdi tann nógva nebbasildin, at føðiviðurskiftini eisini blivu góð hjá størri fiski, bæði í 2017 og út á árið 2018 (Mynd 9). Tey góðu náttúrligu føðiviðurskiftini gjørdu samstundis, at fiskurin tók illa húk.

Men av tí at lítið kom undan í 2018, minkaði skjótt við nebbasild, tá tað leið út á árið 2018 (Mynd 9). Bæði toskur og hýsa gjørdust rak og tann toskurin, sum var ringast fyri, kom heilt inn undir land. Samstundis fór fiskurin nú at taka húk betur, enn hann hevði gjørt frammanundan (tá hann hevði nógv av náttúrligari føði at eta).

Tann vánaliga gongdin helt fram í 2019-2022. Gróðurin sveik (Mynd 7), tó hann var yvir miðal í 2022 og 2023, og yngulin var bæði fáur og smáur – eisini tann yngulin, sum skal vera føði hjá botnfiski (Mynd 8). Samstundis minkaði tilgongdin av 1 og 2 ára toski og hýsu.

Úrslitið er, at toskastovnurin ikki væntast at økjast í framtíðini, sum annars hevur verið væntað. Neyðugt er at fáa betri mát fyri árgangsstyrki hjá toski og í tí sambandi hevði verið gott við neyvari vitan um tær innaru leiðirnar, har toskur veksur upp.

Umhvørvið hevur eisini stóran týdning fyri veiðuna av toski og hýsu og hvussu nógv ein fiskidagur fiskar. Tá nógv er til av nebbasild, fiskar línan bara ein triðing í mun til, tá lítið er til av nebbasild (Mynd 10). Fyri aðrar skipabólkar sveiggja veiðuevnini eisini nógv frá einum ári til annað (Mynd 11). Hetta ger, at sambandið millum tal á fiskidøgum og veiðutrýst er eitt sindur leyst og veldst nógv um umhvørvið.




*Mynd 9. Nøgd av nebbasild í toskamagum samanborið við tilgongd hjá toski. Nøgdin av nebbasild er eitt miðaltal fyri mars og august mánað og svarar til prosent av toskavektini.*




*Mynd 10. Vísital fyri nøgd av nebbasild í toskamagum (í mars og august undir einum) og veiðuevni fyri tosk (roknað sum veiðutrýst per fiskidag) hjá bólki 3 (línuskip).*




*Mynd 11. Veiðuevni (roknað sum veiðutrýst per fiskidag) hjá ymsu skipabólkunum. Fyri tosk ovara mynd, fyri hýsu niðara mynd.*

**Ójavnvág í vistskipanini**

Hóast umhvørvið hevur nógv at siga fyri botnfisk á føroyska landgrunninum eru ábendingar um, at javnvágir/ójavnvágir í vistskipanini eisini hava stóran týdning. Vanliga fáast bert góðir árgangir av toski/hýsu, tey ár, tá gróðurin er góður. Gróðurin var góður í 2017 og førdi til nógva nebbasild. Nøgdirnar av smáum fiski (toski og hýsu) vóru eisini sera stórar. Kortini yvirlivdi ikki so nógv av hesum smáfiski, møguliga tí, at føðin treyt og tí, at toskur kom inn móti landi (Mynd 12). Ein størri nøgd av stórum fiski hevði møguliga kunnað minkað um nøgdirnar av smáum fiski og varðveitt eina betri javnvág í vistskipanini.




*Mynd 12. Nøgd av merktum toski, sum er afturfingin nær landi í juni-desember 1998-2021. Hetta er samanborið við Fulton konditiónsfaktor, sum vísir, hvussu feitur toskur er. Toskur kemur inn móti landi, tá hann er rak.*

**Onnur átøk**

Umframt at skerja fiskidagatalið hjá Bólki 2 og 3-5 er neyðugt at seta onnur átøk í verk fyri at verja toskastovnin á føroyska landgrunninum. Gýtingarfriðingarnar eiga at leingjast við t.d. 14 døgum í báðum endum. Økir við smáfiski eiga at steingjast fyri vinnuliga veiðu. Hjáveiðan av toski hjá teimum ymsu skipabólkunum eigur at minkast við tøkniligum broytingum ella við at áseta bráfeingis veiðubann á ávísum økjum. Fyri at taka atlit til fiskasløg á djúpum vatni verður mælt til, at reglan um at fáa 3 dagar uttan fyri ringin fyri 1 dag innan fyri ringin (3:1) verður broytt til 2:1.

**Føroyabanki**

Føroyabanki varð friðaður fyri nærum øllum vinnuligum fiskiskapi grynri enn umleið 200 metrar í 2008, tí toskastovnurin hevði verið so lítil síðan 2006. Í 2020-21 var tó meira at fáa av toski í yvirlitstrolingunum, sum bendi á, at toskastovnurin var í ferð við at koma fyri seg aftur. Í Havstovu-tilmælinum frá desember 2021 varð mælt til, at tað varð opnað upp fyri eini varisligari vinnuligari veiðu á Føroyabanka við húki. Havstovan mælti til, at tað vórðu tillutaðir 200 fiskidagar til ein blanding av smáum og stórum línuførum. Fyri at verja toskastovnin, varð mælt til at friða gýtingarleiðirnar hjá toski eystan fyri 8°37’ W frá 15. februar til 15. mai. Landsstýrismaðurin valdi tó at útluta fleiri fiskidagar, enn Havstovan mælti til. Lítið er av botnfiski á Landgrunninum og Føroyabanki er tað einasta økið undir Føroyum, har líkinda nøgdir eru av botnfiski. Føroyabanki tolir lítið av roynd og tað eigur tí at verða farið varisliga fram. Yvirlitstrolingarnar í september 2023 vístu, at toskurin á Føroyabanka var rak í mun til onnur ár. Hetta bendir á, at tað ikki er so nógv føði á Føroyabanka og at hetta kann føra til stórt veiðutrýst, tí toskur í stóran mun kemur á línuna, tá hann er rak. Havstovan mælir tí til, at fiskidagatalið í 2024 verður broytt frá 200 til 150 hjá einum blandingi av stórum og smáum fiskiførum við húki (línu ella snellu).

Havstovan, 6-12-2023

Marita Rasmussen, stjóri

## Fylgiskjal 1:

**Heildarveiða og úrslit frá stovnsmetingum fyri upsa, hýsu, tosk á Landgrunninum og tosk á Føroyabanka.**

# UPSI




*Mynd 1. Heildarveiða av upsa frá 1961 til 2022. Miðalvirðið er 35,0 túsund tons. Reyður stabbi forsøgn 2023 = 9.719 t.*




*Mynd 2. Tilgongd av 3 ára gomlum upsa frá 1961 til 2022, frá stovnsmetingini í 2023. Óvissan er víst sum grátt øki. Miðalvirðið er 23,9 milliónir. Reyðir krossar forsøgn: 2023=5.314, 2024=8.601.*




*Mynd 3. Gýtingarstovnurin av upsa frá 1961 til 2022, frá stovnsmetingini í 2023. Óvissan er víst sum grátt øki. $B_{trigger}$ og $B_{pa}$ eru 36,4 túsund tons. $B_{lim}$ er 25,0 túsund tons. Reyðir krossar forsøgn: 2023=50.929 t, 2024=52.547 t.*




*Mynd 4. Veiðutrýst fyri upsa frá 1961 til 2022, frá stovnsmetingini í 2023. %-virðið høgrumegin vísir, hvussu stórur partur verður fiskaður úr stovninum hvørt ár. Óvissan er víst sum grátt øki. $F_{lim}$ er 0,98 , $F_{pa}$ er 0,62 og $F_{MSY}$ er 0,38 (24%).*

# HÝSA




*Mynd 5. Heildarveiða av hýsu frá 1957 til 2022. Miðalvirðið er 14,3 túsund tons. Reyður stabbi forsøgn 2023 = 6.478 t.*




*Mynd 6. Tilgongd av 1 ára gamlari hýsu frá 1957 til 2022, frá stovnsmetingini í 2023. Óvissan er víst sum grátt øki. Miðalvirðið er 27,7 milliónir. Reyðir krossar forsøgn: 2023=54.108, 2024=8.887.*




*Mynd 7. Gýtingarstovnur av hýsu frá 1957 til 2022, frá stovnsmetingini í 2023. Óvissan er víst sum grátt øki. $B_{trigger}$ og $B_{pa}$ eru 23,0 túsund tons. $B_{lim}$ er 16,5 túsund tons. Reyðir krossar forsøgn: 2023=42.894 t, 2024=60.502 t.*




*Mynd 8. Veiðutrýst fyri hýsu frá 1957 til 2022, frá stovnsmetingini í 2023. %-virðið høgrumegin vísir, hvussu stórur partur verður fiskaður úr stovninum hvørt ár. Óvissan er víst sum grátt øki. $F_{lim}$ er 1,43, $F_{pa}$ er 0,54 og $F_{MSY}$ er 0,27 (22%).*

# TOSKUR á Landgrunninum




*Mynd 9. Heildarveiða av toski á Landgrunninum frá 1959 til 2022. Miðalvirðið er 20,0 túsund tons. Reyður stabbi forsøgn 2023 = 4.915 t.*




*Mynd 10. Tilgongd av 1 ára gomlum toski á Landgrunninum frá 1959 til 2022, frá stovnsmetingini í 2023. Óvissan er víst sum grátt øki. Miðalvirðið er 15,2 milliónir. Reyðir krossar forsøgn: 2023=2.915, 2024=4.917.*




*Mynd 11. Gýtingarstovnur av toski á Landgrunninum frá 1959 til 2022, frá stovnsmetingini í 2023. Óvissan er víst sum grátt øki. $B_{trigger}$ og $B_{pa}$ eru 24,7 túsund tons. $B_{lim}$ er 17,8 túsund tons. Reyðir krossar forsøgn: 2023=9.269 t, 2024=8.830 t.*




*Mynd 12. Veiðitrýst fyri tosk á Landgrunninum frá 1959 til 2022, frá stovnsmetingini í 2023. %-virðið høgrumegin vísir, hvussu stórur partur verður fiskaður úr stovninum hvørt ár. Óvissan er víst sum grátt øki. $F_{lim}$ er 1,47, $F_{pa}$ er 0,69 og $F_{MSY}$ er 0,37 (28%).*

# TOSKUR á Føroyabanka




*Mynd 13. Heildarveiða av toski á Føroyabanka frá 1965 til 2022. Frá 2008 hevur Føroyabanki stórt sæð verið friðaður fyri fiskiskapi. Miðalvirðið er 1,53 túsund tons.*




*Mynd 14. Veiða upp á roynd av toski frá yvirlitstrolingum hjá Magnusi Heinasyni á Føroyabanka á sumri. Veiða upp á roynd er eitt lutfalsligt mát fyri, hvussu stórur stovnurin er. Óvissan er víst sum grá øki. Miðalvirðið er 296,7 kg/tíma um summarið, árini 1996 til 2002.*

# Fylgiskjal 2:

# Yvirlit yvir fiskidagar.

*Talva 1. Tal á tillutaðum fiskidøgum (vegleiðandi).*

| | Bólkur | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Fiskiár | 2 ytri | 2 innari | 3 | 4 A | 4 B | 4 T | 5 | Dagar íalt | Íalt bólkur 2-4 |
| 1996/1997* | | 8225 | 3040 | 4700 | 3080 | | 22000 | 49585 | 20275 |
| 1997/1998 | | 7199 | 2660 | 4696 | 4632 | | 23625 | 43389 | 19187 |
| 1998/1999 | | 6839 | 2527 | 4461 | 4400 | | 22444 | 41219 | 18227 |
| 1999/2000 | | 6839 | 2527 | 4461 | 4400 | | 22444 | 41219 | 18227 |
| 2000/2001 | | 6839 | 2527 | 4461 | 4400 | | 22444 | 41219 | 18227 |
| 2001/2002 | | 6839 | 2527 | 4461 | 4400 | | 22444 | 40671 | 18227 |
| 2002/2003 | | 6771 | 2502 | 4416 | 4356 | | 22220 | 40265 | 18045 |
| 2003/2004 | | 6636 | 2452 | 4328 | 4269 | | 21776 | 39461 | 17685 |
| 2004/2005 | | 6536 | 2415 | 4263 | 4205 | | 21449 | 38868 | 17419 |
| 2005/2006 | | 5752 | 3578 | 1770 | 2067 | 1766 | 21235 | 36168 | 14933 |
| 2006/2007 | | 5752 | 3471 | 1717 | 2005 | 1713 | 20598 | 35256 | 14658 |
| 2007/2008 | | 5637 | 3402 | 1683 | 1965 | 1679 | 20186 | 34552 | 14366 |
| 2008/2009 | | 4406 | 2940 | 1323 | 1756 | 1540 | 17259 | 30762 | 12595 |
| 2009/2010 | | 4406 | 2940 | 1323 | 1756 | 1540 | 17259 | 29224 | 11965 |
| 2010/2011 | 1700 | 5174 | 2852 | 1323 | 1756 | 1540 | 13259 | 27604 | 11745 |
| 2011/2012 | 1530 | 4657 | 2657 | 1058 | 1405 | 1386 | 10607 | 23210 | 12603 |
| 2012/2013 | 1530 | 4626 | 2567 | 1011 | 1533 | 1386 | 10607 | 23260 | 12653 |
| 2013/2014 | 1530 | 4441 | 2387 | 1011 | 1533 | 1386 | 9865 | 22153 | 12288 |
| 2014/2015 | 1530 | 4455 | 2887 | 1029 | 1530 | 1386 | 9865 | 22182 | 12317 |
| 2015/2016 | 1530 | 4455 | 2387 | 1029 | 1530 | 1386 | 9865 | 22182 | 12317 |
| 2016/2017 | 1530 | 4386 | 2029 | 859 | 1323 | 1178 | 8879 | 20184 | 11781 |
| 2017/2018 | 1530 | 4386 | 2029 | 859 | 1323 | 1178 | 8879 | 20184 | 11781 |
| 2017/2018 endi | 2040 | 5848 | 2705 | 1145 | 1764 | 1571 | 11839 | 26912 | 15073 |
| 2018 ** | 1530 | 4386 | 2029 | 859 | 1323 | 1178 | 8879 | 20184 | 11305 |
| 2019 | 1530 | 4386 | 2029 | 791 | 1436 | 1178 | 8879 | 20229 | 11350 |
| 2020 | 1530 | 4386 | 2425 | 902 | 1851 | 1584 | 8879 | 21557 | 12678 |
| 2021 | 1607 | 4605 | 2304 | 2304 | | 1505 | 8435 | 20760 | 12325 |
| 2022 | 1687 | 4778 | 2083 | 1774 | | 1430 | 8013 | 19765 | 11752 |
| 2023 | 1771 | 5017 | 1979 | 1685 | | 1358 | 7613 | 19423 | 11810 |

* Fiskiárið er frá 1. sep. - 31. aug.
** Fiskiárið broytt til álmanakkaár

*Talva 2. Tal á brúktum fiskidøgum (vegleiðandi).*

| | | | | Bólkur | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Fiskiár | 2 ytri | 2 innari | 3 | 4 A | 4 B | 4 T | 5A | 5B | Dagar íalt | Íalt bólkur 2-4 |
| 1996/1997* | | | | | | | | | | |
| 1997/1998 | | 6211 | 2469 | 2619 | 3983 | | | | | 15282 |
| 1998/1999 | | 5907 | 2309 | 2147 | 3715 | | | | | 14078 |
| 1999/2000 | | 6497 | 2207 | 2255 | 3995 | | | | | 14954 |
| 2000/2001 | | 6065 | 2469 | 2733 | 4435 | | | | | 15702 |
| 2001/2002 | | 5643 | 2494 | 2454 | 4450 | | | | | 15041 |
| 2002/2003 | | 4688 | 2432 | 2303 | 4554 | | | | | 13977 |
| 2003/2004 | | 5018 | 2186 | 2184 | 5108 | | | | | 14496 |
| 2004/2005 | | 5070 | 2468 | 1647 | 4613 | | | | | 13798 |
| 2005/2006 | | 4381 | 3141 | 1200 | 1717 | 2443 | | | | 12883 |
| 2006/2007 | | 4186 | 2820 | 961 | 1113 | 2208 | | | | 11288 |
| 2007/2008 | | 4524 | 2447 | 582 | 1036 | 1923 | | | | 10512 |
| 2008/2009 | | 4065 | 2273 | 415 | 1016 | 1434 | | | | 9201 |
| 2009/2010 | | 4585 | 2078 | 426 | 1158 | 1382 | | | | 9629 |
| 2010/2011 | | 3883 | 2071 | 405 | 1016 | 1412 | 2856 | 4525 | 17506 | 8787 |
| 2011/2012 | 895 | 4758 | 1986 | 260 | 657 | 1313 | 1834 | 3160 | 14862 | 9869 |
| 2012/2013 | 879 | 3953 | 1205 | 271 | 688 | 1166 | 1410 | 2845 | 12415 | 8162 |
| 2013/2014 | 797 | 3916 | 1120 | 272 | 519 | 895 | 1136 | 3337 | 11992 | 7519 |
| 2014/2015 | 1125 | 4308 | 1235 | 254 | 565 | 717 | 1297 | 3709 | 13210 | 8204 |
| 2015/2016 | 1312 | 3784 | 1452 | 315 | 699 | 919 | 810 | 4421 | 13711 | 8481 |
| 2016/2017 | 1225 | 3882 | 1075 | 280 | 556 | 1111 | 646 | 3440 | 12215 | 8129 |
| 2017/2018 mett | 1202 | 4472 | 963 | 289 | 812 | 990 | 634 | 2904 | 12267 | 8729 |
| 2017/2018 endi | 1390 | 5562 | 1568 | 461 | 895 | 1518 | 887 | 5486 | 17719 | 11394 |
| 2018** | 1043 | 4077 | 1201 | 391 | 718 | 1239 | 785 | 5053 | 14507 | 8669 |
| 2019 | 864 | 3940 | 1665 | 420 | 818 | 1390 | 3801 | 5539 | 18320 | 9097 |
| 2020 | 845 | 3233 | 1759 | 284 | 454 | 1182 | 4022 | 1745 | 13524 | 7757 |
| 2021 | 789 | 3253 | 1382 | 940 | | 1143 | 3143 | 1542 | 12192 | 7507 |
| 2022 | 532 | 2597 | 1471 | 779 | | 1050 | 1995 | 2042 | 10466 | 6429 |
| 2023 mett | 897 | 2759 | 1216 | 708 | | 1026 | 2228 | 2131 | 10965 | 6606 |

* Fiskiárið er frá 1. sep. - 31. aug.
** Fiskiárið broytt til álmanakkaár

*Talva 3. % brúktir fiskidagar í mun til tillutaðar fiskidagar (vegleiðandi).*

| | Bólkur | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Fiskiár | 2 ytri | 2 innari | 3 | 4 A | 4 B | 4 T | 5 | Dagar íalt | Íalt bólkur 2-4 |
| 1996/1997* | | | | | | | | | |
| 1997/1998 | | 86 | 93 | 56 | 86 | | | | |
| 1998/1999 | | 86 | 91 | 48 | 84 | | | | 77 |
| 1999/2000 | | 95 | 87 | 51 | 91 | | | | 82 |
| 2000/2001 | | 89 | 98 | 61 | 101 | | | | 86 |
| 2001/2002 | | 83 | 99 | 55 | 101 | | | | 83 |
| 2002/2003 | | 69 | 97 | 52 | 105 | | | | 77 |
| 2003/2004 | | 76 | 89 | 50 | 120 | | | | 82 |
| 2004/2005 | | 78 | 102 | 39 | 110 | | | | 79 |
| 2005/2006 | | 76 | 88 | 68 | 83 | 138 | | | 86 |
| 2006/2007 | | 73 | 81 | 56 | 55 | 129 | | | 77 |
| 2007/2008 | | 80 | 72 | 35 | 53 | 115 | | | 73 |
| 2008/2009 | | 92 | 77 | 31 | 58 | 93 | | | 73 |
| 2009/2010 | | 104 | 71 | 32 | 66 | 90 | | | 80 |
| 2010/2011 | | 75 | 73 | 31 | 58 | 92 | 56 | 63 | 75 |
| 2011/2012 | 58 | 102 | 75 | 25 | 47 | 95 | 47 | 64 | 78 |
| 2012/2013 | 57 | 85 | 47 | 27 | 45 | 84 | 40 | 53 | 65 |
| 2013/2014 | 52 | 88 | 47 | 27 | 34 | 65 | 45 | 54 | 61 |
| 2014/2015 | 74 | 97 | 43 | 25 | 37 | 52 | 51 | 60 | 67 |
| 2015/2016 | 86 | 85 | 61 | 31 | 46 | 66 | 53 | 62 | 69 |
| 2016/2017 | 80 | 89 | 53 | 33 | 42 | 94 | 46 | 61 | 69 |
| 2017/2018 mett | 79 | 102 | 47 | 34 | 61 | 84 | 40 | 61 | 74 |
| 2017/2018 endi | 68 | 95 | 58 | 40 | 51 | 97 | 54 | 66 | 76 |
| 2018** | 68 | 93 | 59 | 46 | 54 | 105 | 66 | 72 | 77 |
| 2019 | 56 | 90 | 82 | 53 | 57 | 118 | 105 | 91 | 80 |
| 2020 | 55 | 74 | 73 | 31 | 25 | 75 | 65 | 63 | 61 |
| 2021 | 49 | 71 | 60 | 41 | | 76 | 56 | 59 | 61 |
| 2022 | 32 | 54 | 71 | 44 | | 73 | 50 | 53 | 89 |
| 2023 mett | 51 | 55 | 61 | 42 | | 76 | 57 | 56 | 93 |

* Fiskiárið er frá 1. sep. - 31. aug.
** Fiskiárið broytt til álmanakkaár

## Skipabólkar og onnur skip

**Ein partur av fiskiflotanum er býttur upp í hesar høvuðsbólkar:**

| | |
|---|---|
| Bólkur 2: | Trolarar yvir 500 HK |
| Bólkur 3: | Línuskip yvir 110 BT |
| Bólkur 4: | Útróðrarbátar yvir 15 tons<br>*Bólkur 4 er býttur í 4 og 4T.* |
| Bólkur 5: | Útróðrarbátar undir 15 tons á húkaveiðu |

**Umframt skip og bátar, sum eru í bólki 2-5, eru skip sum fáast við aðra veiðu, eitt nú garnaskip, skip sum fáast við skeljaveiðu og krabbaveiðu, ídnaðarskip og uppsjóvarskip.**